# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

## Týdningarleysur sigur

*Hondbóltur, menn: Dysturin millum StÍF og Kyndil var merktur av, at hvørki av liðunum hevði nakað at spæla fyri*

Jákup Mørk

StÍF-Kyndil 28-24 (14-12)

Dysturin, sum í fjør var avgerandi fyri, hvar FM-heitið skuldi enda, var í ár fullkomuliga uttan týdning, og tískil bar til at framskunda dystin til mikukvøldið.

StÍF var undan dystinum fýra stig framman fyri Kyndil og fýra stig aftan fyri VÍF, og tí var longu avgjørt, at bronusmerkini undir øllum umstøðum skuldu inn á Skála.

Hóast hetta var seinasti dysturin hjá báðum liðunum, so vórðu eingi bronsumerki at síggja inni á Skála mikukvøldið, men verða hesi ístaðin handa í Vestmanna leygardagin, saman við gull- og silvurmerkjunum.



*Sveinbjørn Poulsen spældi sín síðsta dyst fyri StÍF mikukvøldið*
**Mynd: Álvur Haraldsen**

Um dystin sjálvan er annars ikki tað stóra at skriva.

Frá byrjan av var sjónligt, at liðini lítið og einki høvdu at spæla fyri, og serliga tóktust havnarmenninir at hava striltið við at taka dystin í nóg stórum álvara.

Eftir eitt time-out tíðliga í hálvleikinum, kom tó meira glið á spælið, og Kyndil vann seg fram um strandingar, áðrenn hesir svaraðu aftur.

Nakað av lívi kom nú í fáu áskoðararnar, sum vóru møttir til dystin, men hóast hesi royndu at gera sítt, so varð talan ongantíð um nakran dyst, sum veruliga fekk sinni á leikarum ella áskoðarum upp á kók. Týdningurin av dystinum var snøgt sagt ov lítil.

Seinni hálvleikur gekk við sama lag. Ferðin kom ongantíð longur enn upp í triðja gear, og eftir at Kyndil fekk tað betru byrjanina, so kom meira glið á spælið hjá strandinum sum hálvleikurin leið.

Tað skal tó eisini sigast, at nógvu strandamálini seinnu hálvu av hesum hálvleikum, líka so nógv skyldaðust, at Kyndilsleikararnir spældu sera ókonsentrera hesa løtuna, og at strandingar tískil kundu seta fleiri kontraálop í gongd.

Móti endanum av dystinum kom leikandi venjarin, Jónleif Sólsker, á vøllin, og hann mundi fáa flestu klappini henda dagin, tá hann skeyt trý mál rað.

Hann kundi eisini skotið seinasta málið í dystinum, men hann var ov seinur at renna eftir bóltinum, tá strandingar fingu brotskast, og tískil varð tað ístaðin Bent Djurhuus, sum slapp at skjóta seinasta fyrstudeildarmálið á Skála á hesum sinni.

### Spenningurin verður í Vestmanna

Sostatt endaðu strandingar árið við einum sigri, og hóast alt, so mundi kenslan ikki vera so galin koritni. Kanska serliga hjá Sveinbirni, sum eftir dystin boðaði frá, at hetta so avgjørt var seinasti dystur hansara í fyrstu deild. Hetta hevur hann tó sagt fyrr, so…

Kanska var eisini talan um seinasta dystin hjá Jónleifi í hvíta búnanum, men eftir dystin segði hesin tó, at hann enn ikki hevði tikið avgerð um nakað sum helst.

Mótstøðumaður hansara á beinkinum, Sophus Dahl Christiansen, verður so, um einki óvæntað hendir, eisin í venjarasessinum hjá Kyndli komandi kappingarárið, og ivaleyst hevur hann vónir um, at Kyndil kann gerast drúgvari komandi vetur.

### Dysturin í tølum

Málskjúttar:
StÍF: Leivur Justinussen 7 (1), Artur Johansen 5 (2), Pauli Hansen 4, Jónleif Sólsker 3 (1), Sveinbjørn Poulsen 3, Marius Joensen 2, Karsten Danielsen 2, Bent Djurhuus 1 (1), Poli Hansen 1
Kyndil: Hans Áki Dahl Christiansen 8 (1), Jacob Jónsson 7 (2), Rúni Poulsen 3 (1), Regin Petersen 3, Bjarni Wardum 2 (1), Uni Wardum 1 (1),
Brotskøst:
StÍF 6, Kyndil 8
Útvísingar:
StÍF 5, Kyndil 5
Dómarar úr Neistanum/ H71:
Kristian Johansen og Kristian Martin Skála

## VÍF vinnur

*Tað vóru venjararnir hjá Kyndli og StÍF samdir um eftir dystin mikukvøldið*

Jákup Mørk

Eftir at Kyndil og StÍF mikukvøldið høvdu leikt seinasta dystin í hesum kappingarárinum, hittu vit venjararnar báðar á málið.

Vit settu teimum báðum tríggjar stuttar spurningar:

*Hvat heldur tú vera ávíkavist positivt og negativt við kappingarárinum fyri tykkara viðkomandi:*

Sophus: Fyri at taka tað negativa fyrst, so haldi eg, at vit hava verið ov óstøðugir í avrikum okkara. T.d. eru fleiri dystir, har vit hava ligið til at vunnið, men sum vit síðani hava tapt í seinastu løtu. Vit eru tó sjálvir greiðir um henda trupulleika, og tað mugu vit so arbeiða við til komandi kappingarár.

Mest positiva er sjálvandi, at vit megnaðu at vinna steypafinaluna.

Eitt annað, sum eg haldi vera keðiligt, at vit framhaldandi hava sjey lið í bestu deildini. Eftir mínari fatan, átti hetta at verið skorið niður í seks lið, soleiðis at vit fingu heldur færri dystir, men við størri kvaliteti í einstøku dystunum.

Jónleif: Fyri okkara part hevur tað mest positiva verið, at vit megnaðu at vera partur av toppinum so at siga alt kappingarárið. At tað so kiksaði móti Neistanum næst seinasta vikuskifti, er so avjørt tað, sum hevur verið mest skuffandi. Serliga var tað hátturin, sum vit taptu upp á, sum eg haldi vera keðiligur, tí vit høvdu allar møguleikar at avgera dystin. Somuleiðis tá vit taptu móti Kyndli í Havn, har vit høvdu eina greiða leiðslu, men kortini taptu dystin.

Annars eri eg fullkomuliga samdur við Sophus, tá hann sigur, at talið av liðum í bestu deildini eigur at verða skorið niður í seks. Um eitt felag ikki klárar at manna eitt, so er altso eingin orsøk at vera við í fyrstu deild.

*Hvat lið halda tit fer at vinna gulldystin í Vestmanna:*

Jónleif: Eg havi tippað VÍF fyrr, og tað geri eg framvegis

Sophus: VÍF hevur royndirnar. Teir hava verið í toppinum fyrr, meðan Neistaleikararnir ikki eru so vanir við leiklutin. Tað sá man kanska eisini í steypafinaluni, har teir føra nógv, men har vit kortini megna at venda dystinum.

Hinvegin hevur Neistin nakrar skjúttar, sum kunnu avgera alt sjálvir, um teir sleppa fram at.



*Bæði Sophus Dahl Christiansen, omanfyri og Jónleif Sólsker, niðanfyri, vænta at tað verður VÍF sum strýkur avstað við gullinum leygardagin*
**Myndir: Álavur Haraldsen**





## Pól fer til Íslands

*Fótbóltur: Nú er greitt, at landsliðsleikarin Pól Thorsteinsson úr VB, skal spæla við íslendska felagnum Valur. Enn er tó ikki greitt, um hann fær ein annan føroyskan landsliðsleikara, Henning Jarnskor, sum liðfelaga, hóast tað er nógv, sum bendir á tað*

Terji Nielsen

Nú er nakað væl útliðið, síðani teir báðir Pól Thorsteinsson og Henning Jarnskor vóru og royndarvandu við íslendska felagnum, og nú er so greitt, at í hvussu so er Pól Thorsteinsson fer at skifta til íslendska felagið. Pól og Valur, sum spælir í næstbestu íslendsku deildini, eru komin ásamt um persónligu viðurskiftini hjá vágbinginum, og fyrsta dagin verður endaliga sáttmálin so undirskrivaður.

### Hjá Henningi er einki avgjørt enn

Nógv bendir á, at Pól Thorsteinsson fær gøtumannin Henning Jarnskor sum liðfelaga í Vali. Íslendska felagið er komið ásamt við GÍ um samsýningina, sum gøtumenn skulu hava fyri at lata landsliðsmannin fara til Íslands, men enn eru persónligu viðurskiftini hjá Henningi ikki komin upp á pláss. Henning sigur við Sosialin, at samráðingarnar millum hann og Val halda fram, men hann roknar ikki við, at nøkur endalig avgerð verður tikin fyrr enn hendan vikan er komin at enda.

Tað er tó eisini okkurt, sum kundi bent á, at íslendingarnir kenna seg rættuliga tryggar í at fáa bæðI Pól og Henning til Íslands, tí at heimasíðuni hjá felagnum, www.valur.is, er ein lýsing, har felagið søkir eftir tveimum ella trimum íbúðum sum skjótast, og man tað ikki vera við føroysku leikarunum í huga, at hendan lýsingin er gjørd?



*Nú er greitt at føroyski landsliðsleikarin Pól Thorsteinsson fer at skifta til íslendskan fótbólt har hann skal leika við felagnum Valur, sum spælir í næstbestu íslendsku deildini*

## Grand Prix kappingarnar í badminton lidnar

*Seinastu umførini í Grand Prix kappingunum í badminton í vetur eru nú spældar, og bæðI hjá vaksnum og børnum hevur man nú funnið vinnararnar*

Terji Nielsen

Badmintonárið 1999/2000 er við at fara aftur um bak, og nú er bert føroyameistaraskapurin eftir at spæla um. Stóru Grand Prix kappingarnar eru lidnar, og í hesum kappingum hava nógvir dystir verið spældir í vetur. Tey vaksnu hava spælt ikki færri enn tíggju umfør í Grand Prix kappingini, meðan børnini hava spælt fimm umfør.

### Elin og Erland vunnu hjá teimum vaksnu

Hjá monnunum var tað ikki óvæntað Erland Poulsen, ið gjørdist vinnari av samlaðu Grand Prix kappingini í ár. Erland hevur seinnu árini verið nógv tann stinnasti badmintonleikarin her á landi, og hann er eisini stórfavorittur til at vinna føroyameistaraheitið, sum spælast skal um miðskeiðis í apríl mánaða. Erland fekk samanlagt 2.345 stig, meðan Regin Hammer, ið gjørdist nummar tvey fekk 2.320 stig. Á triðjaplássinum kom veteranurin Heðin Joensen við 1.770 stigum. Hesir eru allir úr HBF.

Vinnari hjá kvinnunum gjørdist Elin Jacobsen úr HBF. Hon fekk samanlagt 2370 stig, meðan Ingun Hansen úr Stráluni á øðrumplássi fekk 2310 stig. Triðbesta kvinnan gjørdist Guri Poulsen úr HBF, sum fekk 2295 stig, so talan var um eina rættuliga javna kapping hjá kvinnunum.

### Erland og Ragnar fingu sera gott úrslit í Íslandi

Í vikuskiftinum vóru teir báðir Erland Poulsen og Ragnar Rasmussen í Íslandi, har teir tóku lut í stórari badmintonkapping í Reykjavík. Umframt teir báðar føroyingarnar, so vóru eisini fleiri aðrir útlendingar við í kappingini, millum annað nakrir sera sterkir danskir leikarar.

Erland og Ragnar leiktu í A-bólkinum, sum er næstbesti bólkurin, og í tvímansleiki eydnaðist tað teimum báðum at spæla seg í finaluna og eisini vinna hana. Í einmansleiki kom Ragnar í hálvfinaluna, meðan Erland tapti í fjórðingsfinaluni.



*Frá vinstru: Nr. 2 Ingun Hansen, Strálan, nr. 1 Elin Jacobsen, HBF og nr. 3 Guri Poulsen, HBF*



*Frá vinstru: Nr. 2 Regin Hammer, HBF, nr. 1 Erland Poulsen, HBF og nr. 3 Heðin Joensen, HBF*

### Unglingalandslið til Svøríkis

Í mai mánaða fer eitt føroyskt unglingalandslið til Svøríkis, har tað skal taka lut í eini stórari opnari kapping við luttakarum úr nógvum londum. Hetta er ein afturvendandi kapping, sum føroyskir badmintonungdómar hava tikið lut í í nógv ár. Hvørji tey verða, sum skulu til Svøríkis at umboða Føroyar, verður ikki greitt fyrr enn um miðjan apríl mánað, tá Ið tey skulu spæla um at sleppa við.

Annars verður føroyameistarakappingin hjá teimum ungu hildin nú í vikuskiftinum. Tá Ið so føroyameistaraheitið hjá teimum vaksnu verður avgjørt um miðjan apríl mánað, er badmintonárið 1999/ 2000 av her heima.

LESIÐ ÍTRÓTTIN Á INTERNETINUM
www.sosialurin.fo